# Broytingar í fólkaskúlalógini

TÍÐINDASKRIV

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur ætlanir um at fremja broytingar í Fólkaskúlalógini við gildi frá 1. august 2006 at rokna.

Høvuðsbroytingarnar eru hesar:

Byrjanarundirvísingin í enskum verður flutt niður í 3. flokk.

Setanin av lærarum verður løgd út til skúlaleiðar-arnar.

Skúlastýrisvalini verða hildin samstundis sum bý-/bygdaráðsvalini.

## Viðvíkjandi enskum

Broytingarnar í enskum snúgva seg um at flyta ensktundirvísingina niður í 3. og 4. flokk. Enska málið er ein týdningarmikil samskiftislykil í alheimsgerðingini. Harafturat eru flestu børn kunnug við enskt mál, áðrenn tey fara í skúla. Tað kann tí tykjast nakað rangvørgt, at tey ikki fáa undirvísing í enskum, fyrr enn tey eru komin í 5. flokk.

Í flestu norðurlendsku grannalondum okkara byrjar ensktundirvísingin fyrr enn her hjá okkum. Eitt alment orðaskifti hevur júst verið, um næmingar fólkaskúlans eiga at byrja fyrr við enskum.

Sum er, byrja næmingarnir at læra danskt í 3. flokki. Hildið verður ikki, at tað fer at ørkymla frálæruna í donskum ella føroyskum, um byrjað verður við enskum í 3. flokki við 1 undirvísingartíma um vikuna. Ætlanin er at hava 2 undirvísingartímar um vikuna í 4. flokki.

## Viðvíkjandi setan av lærarum

Við at leggja ábyrgdina av setan út til skúlaleiðaran, fer starvssetan í fólkaskúlum fram á sama hátt sum í flestu øðrum skúlum og stovnum. Bæði út frá fyrisitingarligum og leiðslupolitiskum sjónarmiðum er tað rættari, at tað er skúlaleiðarin, sum er setanarmyndugleiki, tí hann frammanundan hevur ábyrgdina av størsta partinum av setanartilgongdini og av dagligu arbeiðsviðurskiftunum hjá starvsfólki skúlans.

## Viðvíkjandi skúlastýrisvalunum

Broytingarnar viðvíkjandi skúlastýrisvalinum eru mest av praktiskum slagi. Tað er sera tíðarkrevjandi at skipa fyri sjálvstøðugum skúlastýrisvali, harumframt er eisini eykakostnaður tengdur at valinum, tá ið tað ikki er samstundis, sum valið til kommunustýrini. Tó er vert at viðmerkja, at tað eru ikki somu veljarar til kommunu?stýrisvalini sum til skúlastýrisvalini. Treytin, fyri at vera valbærur og at kunna velja til skúlastýrið, er, at viðkomandi eigur børn í skúlanum. Skipanarliga skuldi hetta ikki kunnað forðað fyri, at valini eru samstundis.

Ætlan landsstýrismansins er, at lógaruppskotið skal leggjast fyri Tingið í hesi tingsetuni sigur Mentamálaráðið í tíðindaskrivinum.

# Jensina Olsen framsýning í Mentamálaráðnum

TÍÐINDASKRIV

Jensina Olsen letur upp listaframsýning í Mentamálaráðnum hósdagin 13. januar 2005, kl. 15.00 - 17.00. Framsýningin er opin mánadag til hósdag kl. 08.00 - 16.00, fríggjadag kl. 08.00 - 15.00.

Jensina Olsen er 34 ár, og hevur nomið sær útbúgving innan myndlist á Billed-skolen í Keypmannahavn.

Hon sýndi fyrstu ferð fram á Ólavsøku í 1999, og hevur síðan verið við á Ólavsøkuframsýningini í Listaskálanum á hvørjum ári. Várið 2004 var hon fyrstu ferð við á Várframsýningini í Listaskálanum, har hon sýndi fram 17 oljumálningar, undir felagsheitinum "Býarbrot", sum var ein installatión við íblástri av Keypmannahavn. Annars hevur hon havt framsýningar í Keypmannahavn, saman við øðrum listafólkum, td. Birkerød kunstforening, Norðurbryggjuni og Kunstforeningen Humlen.

Jensina arbeiðir ávikavist við olju, akryl og akvarell. Ofta er installatiónstankin við í hennara arbeiði.

Til hesa framsýning í Mentamálaráðnum hevur hon akvarellir og oljumálningar við. Íblástur til myndirnar er nakað so einkult sum tá nakað møtist. Tvey ting kunnu møtast og útloysa eitt triðja innan í okkum, sum ikki sæst. Framsýningin ber heitið "Afturskin".

Framsýningin í Mentamálaráðnum er opin til 23. mars 2005 og øll eru vælkomin.

# Fýra forkvinnur í Havn

TÍÐINDASKRIV

Tvær kvinnur hava tikið við sum forkvinnur í býráðsnevndum í Havn, og tvær aftrat taka við komandi dagarnar.

Katrin Dahl Jakobsen úr Javnaðarflokkinum varð týsdagin vald til formann í sosialu nevnd. Næstformaður varð valdur Jógvan Arge úr Tjóðveldisflokkinum.

Hinir limirnir í sosialu nevnd eru Elin Lindenskov úr Javnaðarflokkinum. Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum og Beate L. Samuelsen úr Sambandsflokkinum.

Løtu seinni varð fundur settur í teknisku nevnd. Hon skipaði seg við Marini Katrinu Frýdal úr Tjóðveldisflokkinum sum formanni og Katrini Dahl Jakobsen úr Javnaðarflokkinum sum næstformanni.

Hinir limirnir í tekn-isku nevnd eru Leivur Hansen úr Tjóðveldisflokkinum, Sjúrður Olsen úr fólkaflokkinum og Høgni Mikkelsen úr Sambandsflokkinum.

Mikudagin verður Hildur Eyðunsdóttir úr Tjóðveldisflokkinum vald til forkvinnu í mentamálanevndini, og hósdagin skipar heilsu- og umhvørvisnevndin seg við Elini Lindenskov úr Javnaðarflokkinum sum forkvinnu.




Lesið Sosialin -so eru tit við!